# Hugleiðingar á kamari 707



– Tú fært nummar 707.

Tann fryntliga, unga kvinnan í móttøkuni á Hótel Esju legði varisliga lykilin á diskin og brosaði. Fróði undraðist, tá hann hoyrdi nummarið, tí tá hann gisti á hesum hotellinum seinast, búði hann eisini á kamari nummar 707. Mundi hon kenna hann aftur og hava latið hann fáa sama kamarið? Mundi hon...? Nei, hon hevði neyvan verið her, tá hann var her seinast, tí so hevði hann eisini kent hana aftur. Tað vóru jú bara einir tveir mánaðir síðani. Nei, hon hevði neyvan sæð hann fyrr, og hann hevði neyvan sæð hana fyrr. Hetta var bara enn ein av hesum lívsins tilvildum, sum ongantíð koma aftur.

Fróði tók lyftuna upp á sjeyndu hædd. Tað kendist ikki sørt ófrættakent at hanga í leysum lofti í einari íslendskari lyftu. Hvat nú, um ein jarðskjálvti kom, meðan hann var á veg upp? Helst hevði streymurin farið beinanvegin, so lyftan hevði steðgað, og so hevði hann verið hangandi har í kolamyrkri, til bjargingarmenn fingu lyftuna aftur í gongd. Sjálvum hotellinum stúrdi hann ikki fyri, tí hann hevði hoyrt, at øll háhús í Íslandi eru bygd soleiðis, at tey kunnu standa ímóti jarðskjálvtum langt upp eftir Richter-stiganum.

Fróða nýttist ikki at leita eftir kamarinum, tá hann kom úr lyftuni uppi á sjeyndu hædd. Eitt var, at hann visti, hvat kamarshurðin var, men hann kendi eisini røddina á floksfelaganum, sum hann skuldi hava kamar saman við hetta vikuskiftið.

– Er tað tú Fróði? Eg spurdi hana niðri í móttøkuni, hvat kamar tú hevði. Hon vildi ikki geva mær lykil, men hon segði mær nummarið og bað meg seta meg uttan fyri at bíða, til tú komst. So her siti eg. Kom og lat upp, so eg sleppi at skola bygdarluktin av mær, áðrenn vit fara í býin.

Fróði og vinmaðurin gingu í skúla eysturi í sveitini, men nú hevði allur flokkurin gjørt av at fara ein túr til Reykjavíkar at halda vikuskifti. Lívið í sveitini var lítið annað enn skúlagongd og lesing og so onkrir túrar úti í náttúruni, tá ein frídagur var. Vinmaðurin var úr einum av teimum størru plássunum, so gerandisdagurin í sveitini beint undir liðini á einum stórum bóndagarði við ramum deymi av neyta- og rossalorti var ikki júst tað, sum hann var vanur við. Og nú vildi hann sleppa at skola hetta burtur av sær.

Fróði hevði harafturímóti einki ímóti hesum bygdarumhvørvinum. Hann var uppvaksin við bæði kúgv, rossi, seyði og høsnum í kjallaranum, so neytini og rossini hjá bóndanum hoyrdu líkasum til. Hinvegin mátti hann viðganga, at ein heitan summardag kundi deymurin frá bóndagarðinum vera í so ramur. Men hvat? Tað var ikki verri, enn tá hann sum smádrongur og hálvvaksin plagdi at fara heim í neytaliðið eftir neytunum, ella tá hann gekk upp undir øklar í seyðalorti í rættini ein slavtungan heystardag.

Men nú stóð hann her uppi á sjeyndu hædd á Hótel Esju. Vinmaðurin var longu í ferð við at lata seg úr, og vatnið rann longu inni í brúsuni. Fróði dró tað tunga teppið oman av songini við vindeygað og tveitti viðføristaskuna á fótalagið. Hann hevði nú ikki tikið tað nógva við sær. So frætt av klæðum, at hann kundi skifta, skuldi hann fingið karm og taskuna við lappa, tannbust og onkrum góðum at spræna upp á seg. Í mappuni hevði hann nóg mikið av pengum til vikuskiftið og passið, sum hann noyddiat at vísa fram fyri at sleppa inn, har aldursmark var.

Vinmaðurin hevði staðið og sungið fosturlandssangin ”Ísland øgrum skorið” umaftur og umaftur, meðan hann hevði staðið undir brúsuni. Nú var hann tagnaður og stóð og murraði eitt ella annað lag, meðan hann turkaði sær. Vinmaðurin var avgjørt ikki ein av teimum mest tjóðskaparsinnaðu íslendingunum, men eins og flestu landsmenn hansara hevði hann stóran alsk til fosturlandssangir.

Fróði hevði sitið og lurtað eftir vinmanninum. Sjálvur hevði hann bara verið í Íslandi í nakrar mánaðir, men hann skilti longu væl, at íslendingar høvdu ein serligan alsk til sangir um teirra land. Fyri tað fyrsta høvdu íslendingar fleiri framúrskarandi skald, og so dugdu teirra tónasmiðir serstakliga væl at smíða løg, sum fangaðu bæði skilið og hjartað. Á ein ella annan hátt vóru løgini ein mynd av teirri íslendsku náttúruni, so skiftandi og ymisk hon enn er. Tey flestu løgini vóru stillislig og eym, men á ein ella annan hátt kendust tey kortini sum ein mynd ella ein lýsing av teirri ógvusligu náttúruni við eldi, ísi, kókandi keldum og jarðskjálvtum. Mundi nakað land í heiminum hava eina so virkna, eina so ófriðarliga náttúru og kortini fosturlandssangir við løgum, sum kundu fáa hárini á kroppinum at toyggja seg av berum eymleika og einari løgnari kenslu av sælu? Og mundu nakrir aðrir tónasmiðir duga at gera løg, sum gjørdu, at áhoyrarin kundi kenna seg sita og stara niður í Gullfoss og Almannagjá samstundis?

Men hetta var ikki bara skaldunum og tónaskaldunum fyri at takka. Hvussu mangan hevði hann ikki sitið púra í øðrum heimi og lurtað eftir upptøkum við Stefán Íslandi ella Guðmundi Jónssyni, hvørs røddir kundu fáa sjálvt tað mest ívna nakkahárið at reisa seg ein og sama veg. Og so kallakórini, sum á ein ella annan hátt vóru tann fullkomna ljóðliga myndin av íslendsku náttúruni. Djúp sum buldrið úr Heklu ella dunið upp úr Gullfossi og fín sum hvinið ein illveðursdag við Öræfajökull. Løgið, at ein so lítil tjóð kundi fostra so nógv fólk við so stórum og fjølbroyttum gávum.

Fróði sat mest sum í øðrum heimi á songarstokkinum. Hann mintist løturnar niðri á bakkanum við Hvítá í skýmingini, har hann hevði sitið og eygleitt rossaflotan hjá bóndanum. So stórt rossafylgi hevði hann ikki sæð uttan í onkrum cowboyfilmi í Sjónleikarhúsinum ella Havnar Bio í sekstiárunum, tá rossatjóvar stjólu rossini frá indiánarunum.

Men rossini hjá Bjössa bónda fingu frið, har tey gingu á beiti niðri við áarbakkan. Har fekk alt frið. Eisini sílini í ánni. Og her fekk Fróði eisini frið, frið til at hugleiða um lívsins viðurskifti. Og hvørja ferð kom spurningurin, hvat hann gjørdi her. Hvat í Harrans navni gjørdi hann niðri við ein áarbakka í Íslandi einsamallur sum Janus í verðini? Átti hann ikki at verið niðri í Keypmannahavn sum hini, ið høvdu sett sær eitt mál við lívinum? Hvørjum máli fór hann at røkka við at ganga í íslendsku sveitini og mala? Hetta var ikki tað, hann hevði droymt um teir dagarnar, uppreisturin í Sorbonne kom í Hoydalar. Tá hevði hann verið við til at binda brandtogini upp ígjøgnum trappurnar, so lærararnir ikki skuldu sleppa upp at undirvísa. Tá hevði hann kent seg sum uppreistrarmann ímóti valdsharrunumi, og hann hevði flent at teimum, har teir stóðu á gólvinum niðriundir. Tá hevði hann gingið við stórari mynd av Che Guevara á bringuni og hevði skrivað mergjandi yrkingar í skúlablaðið. Jú, tá var hann ein unglingi við framtíðarvisjónum. Tá hevði hann staðið millum nakrar, sum